# Japansk børn ræddust trøllkonuna Maritu Dalsgaard

**Japansku børnini ræddust so illa, at føroyska sjónleikarakvinnan Marita Dalsgaard varð noydd at skrúva niður fyri dramatikkinum, tá hon herfyri framførdi "Býtisbarnið" í japanska býnum Okinawa**

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Føroyska sjónleikarakvinnan fekk veruliga roynt seg, tá hon herfyri varð við til at framføra barnasjónleikin "Býtisbarnið" fyri fleiri hundrað børnum í japanska býnum Okinawa.

### Øgisliga trøllkonan

Millum annað bjóðaði Marita Dalsgaard vælkomin á japanskum, umframt at hon mátti flætta onkur japansk orð inn í leikin, so børnini skiltu betri.

- Eg varnaðist skjótt, at japansku børnini ikki rættiliga skiltu hatta við, at eitt petti av klæði ímyndar býtisbarnið í leikinum, so eg mátti læra meg at siga 'menniskjabarn' á japanskum, sigur Marta Dalsgaard, sum eisini mátti skrúva eitt sindur niður fyri dramatikkinum.

- Vit hava spælt hendan leikin so nógva staðni, so tað kom eitt sindur óvart á, at japansku børnini blivu púra ræðslusligin av trøllkonuni. So eg endaði við at gera hana munandi minni øgisliga, avdúkar Marita Dalsgaard.

Framførslan av "Býtisbarnið" var partur av Kijimuna Festa, ið er ein international barnateaturfestival á Okinawa í Japan. Í ár vóru leikir úr Australien, Týsklandi, Russlandi, Korea, Bali, Onglandi, Japan og Danmark.

Marita Dalsgaard greiðir frá, at í altjóða høpi verður danskur barnasjónleikur mettur at vera á serliga høgum støði, og hevur júst hesin leikurin fingið innbjóðingar frá nógvum ymsum londum, heilt úr Russlandi til Írland.




*Føroyska sjónleikarakvinnan Marita Dalsgaard á japansku lýsingini fyri sjónleikin "Býtisbarnið", sum hon var við til at framføra í japanska býnum Okinawa herfyri*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og eystri og yvirhøvur turt og solglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landnyrðingi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 13 og 17 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 16 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 15 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 13 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 23 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 34 |
| Róm | 29 |
| Malorca | 29 |
| Athen | 31 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 15 |
| New York | 27 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 29 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

### LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1008 hPa. við Vesturnoreg fer spakuliga í landnyrðing. Eitt hátrýst, 1025 hPa. yvir Grønlandi stendur mestsum í stað.



**Í dag:**
Lágtrýstið við Vesturnoreg fer eystureftir. Hátrýstið yvir Grønlandsfjørðinum viknar nakað

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/08 kl. 06⁰⁰ – 04/08 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í august: 0,4° - Mesti hiti máldur í august: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/08 kl. 06⁰⁰ – 04/08 06⁰⁰.
Avfallið higartil í august: 2 mm




Lesið Sosialin

### VESTFALLSKYRRINDI

30. august Mánin næstur jørðini
1. august Tendring
8. august Fyrra kvarter
10. august Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5. aug. | 10:25 | 22:47 | 9:25 | 21:47 | 9:40 | 22:02 | 0:05 | 12:25 | 1:05 | 13:25 | 8:40 | 21:02 | 7:40 | 20:02 | 10:40 | 23:02 | 11:40 | - | 10:10 | 22:32 | 11:25 | 23:47 |
| 6. aug. | 10:47 | 23:28 | 9:47 | 22:28 | 10:02 | 22:43 | 0:47 | 12:47 | 1:47 | 13:47 | 9:02 | 21:43 | 8:02 | 20:43 | 11:02 | 23:43 | 0:02 | 12:02 | 10:32 | 23:13 | 11:47 | - |
| 7. aug. | 11:49 | - | 10:49 | 23:10 | 11:04 | 23:25 | 1:28 | 13:49 | 2:28 | 14:49 | 10:04 | 22:25 | 9:04 | 21:25 | - | 12:04 | 0:43 | 13:04 | 11:34 | 23:55 | 0:28 | 12:49 |
| 8. aug. | 0:10 | 12:46 | 11:46 | - | - | 12:01 | 2:10 | 14:46 | 3:10 | 15:46 | 11:01 | 23:37 | 10:01 | 22:37 | 0:25 | 13:01 | 1:25 | 14:01 | - | 12:31 | 1:10 | 13:46 |
| 9. aug. | 1:22 | 13:59 | 0:22 | 12:59 | 0:37 | 13:14 | 3:22 | 15:59 | 4:22 | 16:59 | - | 12:14 | 11:14 | 23:51 | 1:37 | 14:14 | 2:37 | 15:14 | 1:07 | 13:44 | 2:22 | 14:59 |